# Eitt ár síðani Katrina fór upp á land




**Tann 29. augusat í fjør bar tropiska ódnin Katrina við amerikonsku suðurstrondina við oyðileggingum, sum eingin hevði sæð áður, og sum heldur ikki eru umvældar enn.**

Í New Orleans, Biloxi og øðrum býum fram við amerikonsku suðurstrondini fara fólk ongantíð at gloyma tann 29. august í 2005. Tann dagin fingu tey av álvara at kenna, hvussu sterkar og oyðandi náttúrukreftirnar kunnu vera, og hvussu lítið mannagjørd verjuvirki muna, tá náttúran av álvara spennir seg út.

Meinast raktur var stórbýurin New Orleans. Av teimum 1.836, sum lótu lív í ódnarveðrinum, vóru 1.577 úr New Orleans. Tað var ikki vindurin, sum kostaði teimum lívið, men tann stóra vatnflóðin, sum legði tað mesta av býnum undir, tá byrgingarnar fram við Meksikanska Flógvanum og Mississippi-ánni fóru.

Tað vóru serliga eldri fólk, sum doyðu. Sambært hagtølunum vóru 40 prosent oman fyri 75 ár og 60 prosent oman fyri 65 ár. Eftir sjónvarpsmyndunum úr New Orleans vóru tað serliga tey svørtu, sum fingu sviðan av Katrinu, men tað var ikki so løgið, tí 67 prosent av fólkinum í býnum vóru svørt. Hinvegin vísa tølini, at lutfalsliga mong hvít doyðu. Tá ódnin herjaði býin, vóru 28 prosent av fólkinum hvít, men 39 prosent av teimum, sum doyðu, vóru hvít.

## Vánalig tilbúgving

Katrina avdúkaði, at hvørki tann lokala ella tann landsumfatandi tilbúgvingin virkaði eftir ætlan, og at tær vóru als ikki førar fyri at átaka sær tær nógvu og stóru uppgávurnar, sum ódnin hevði við sær. Harafturat avdúkaði ódnin, at umsitingin á tilbúgvingar- og hjálparøkinum virkaði illa, og at í veruleikanum vóru amerikanarar betur fyrireikaðir til at hjálpa neyðstøddum uttanlands enn heima hjá sær sjálvum.

Í áravís høvdu serfrøðingar ávarað tann politiska myndugleikan um, hvat kundi henda, um ein av teimum ringastu ódnunum rakti láglendið fram við suðurstrondini, men teir høvdu ikki fingið ljóð í Washington. Og tá Katrina fór í land, var ov seint.

Teir lokalu lokalu myndugleikarnir fingu heldur ikki ljóð í Washington tann 29. august í 2005, og tað vakti stóran ans, at tað gingu fleiri dagar, áðrenn George W. Bush, forseti, legði leiðina til suðurstatirnar at kunna seg um skaðan. Har lovaði hann, at stjórnin fór at játta tann neyðuga peningin til at endurbyggja tað, sum var farið, samstundis sum sterkari byrgingar skuldu forða fyri, at sorgarleikurin skuldi endurtaka seg eina aðru ferð.

Bush helt orð, hvat pengunum viðvíkir, tí stjórnin hevur játtað meiri enn 100 milliardir dollarar til endurbyggingina, men kortini hevur sjálvt endurbyggingararbeiðið gingið ógvuliga seint. Tað kemst serliga av, at myndugleikarnir í Washington og teir lokalu myndugleikarnir í suðurstatunum eru ósamdir um, hvat pengarnir skulu brúkast til, og tí eru bara góðar 40 milliardir dollarar brúktir higartil.

Og árstíðin við ódnum í Karibiska Havinum er byrjað!

## Politikkur uppií

Í gjár var Bush aftur í suðurstatunum og vitjaði í sambandi við ársdagin.

- Her er nógv eftir at gera, men tað er vón fyri stavn. Í veruleikanum eru vit júst farin undir eitt arbeiði, sum fer at taka langa tíð, segði forsetin, tá hann hitti borgarstjóran í New Orleans, Ray Nagan, ið gjørdist kendur um allan heimin fyri einum ári síðani.

Í november verður miðval í USA, og Katrina er vorðin partur av valstríðnum. Demokratarnir vísa á, at enn ganga børn í New Orleans í skúla í stórum lastbilum, tí skúlarnir vórðu oyðilagdir fyri einum ári síðani, og at tað er stjórnin í Washington, sum hevur skyldina av, at endurbyggingin gongur so seint. Fleiri vilja eisini vera við, at stjórnin hevur ikki lagt so stóran dent á málið, tí tey flestu, sum vórðu rakt, eru svørt.

Bush viðgekk í gjár, at Katrina hevði givið amerikanarunum nakað at hugsa um, men hann avsannaði, at húðaliturin hjá teimum raktu hevur ávirkað arbeiðslagið hjá stjórnini.

- Tann, sum sigur tað, roynir at gera sær dælt av einum álvarsmáli, segði forsetin.



*George W. Bush, forseti, og borgarstjórin í Biloxi, A. J. Holloway, spákaðu sær ein túr í býnum í gjár. Biloxi fór illa av ódnarveðrinum fyri einum ári síðani.*